**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Nebbasild á Landgrunninum. Túrur nr. 0966**
**Tíðarskeið 22/8 - 24/8 - 2009**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen.

**Ábyrgd:** Kirstin Eliassen

**Endamál:**
At fáa til vega nebbasild til lívfrøðiligar kanningar. Tær lívfrøðiligu kanningarnar eru: longd, vekt, kyn, kynsbúning, aldur, føðival, føðimøguleikar og orkuinnihald.
At kanna vistskipanina á landgrunninum umvegis isotop-analysur av nebbasild.

**Reiðskapur:**
Glúpur.
Kassatrol 116 Steinhamns hurðar.
Vanligur grunnur.
Breitlalongd 60 m.
Trolposi 5 mm meskar (yngulposi).

**Um túrin:**
Fóru av Havnini leygarkvøldið 22. aug. og vóru aftur eftir loknan túr mánadagin tann 24. aug. 2009.

**Fyribilsúrslit:**
Veðrið var gott, tó at tað var nakað grátt. Vit byrjaðu á Dalsendanum, hildu leiðina eystur um Fugloynna fyri síðan at fara norður um, fyrst varð kastað norður úr Kollinum, og síðan norður úr Mykinesi.

Vit høvdu fýra tóv í alt, og bert í ljósum. Tað var sera lítið í. Sí baksíðuna.

Vit høvdu 4 stutt hál á 45 - 60 minuttir.

Vit høvdu trolið úti í tilsamans 200 minuttir, har vit fingu tilsamans um 350 nebbasildir. Tað svarar til um 100 nebbasildir um tíman.

Á Havstovuni 25. aug. 2009

Mourits Mohr Joensen.